# Landsfundur 2003
í Hvalba 14. og 15. nov.

**Fríggjakvøldið 14. nov.**
kl. 19.30 Landsfundurin verður settur
kl. 20.15 Gestarøðari: Hanus Kamban, rithøvundur
kl. 21.00 Frágreiðing skrivarans og orðaskifti
kl. 21.30 Frágreiðing frá feløgunum
kl. 23.00 Fundurin niðurlagdur

**Leygardagin 15. nov.**
kl. 09.00 Formansfrágreiðing
kl. 10.00 Aðalorðaskifti
kl. 12.00 Matarsteðgur
kl. 13.00 Evnisorðaskifti
- Vælferðarsamfelag og høgrasnaring
- Reyð-grøn dagsskrá
- Eldrapolitikkur og serforsorgin
- Privatiseringar og søla av alm. ognum

kl. 15.00 Val av starvsnevnd og floksleiðslu
kl. 16.00 Ymiskt, innkomin uppskot Landsfundarsamtykt

**Landsfundarveitslan** verður kl. 19.30 í Roynhøllini

**Føroya Javnaðarflokkur**



**Starv**

# Lærlingur til verkstaðið



Á verkstaðnum, sum er undir Farmaleiðum, er eitt starv sum lærlingur leyst at seta.

**Starvið fevnir um**
Viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, trukkar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap
- Tað er ein fyrimunur um tú hevur SIT-útbúgving

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaði skulu senda umsókn til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 3. november 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Boga í Gil, verkførara, á tel 543066 ella e-post: big@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30



ÚTBERARAR



Søkt verður eftir fólki
at bera **bløð** út á Sandi

Áhuga ringið
**tel 211201**
ella send ein teldupost:
**prent@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**
SMYRILSVEGUR 13 · POSTBOKS 3314 · 110 TÓRSHAVN



BILSKROKK




**Lakkering & Plátuverkstaður**

Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.

Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.

**- Tlf. 32 24 71 -**

Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn




# Hjálpartólamiðstøðin miðdepil fyri ráðstevnu hjá rehabtøkningum í Danmark

Í hesum døgum hevur tøkniliga deildin á Hjálpartólamiðstøðini (HTM) í Føroyum vitjan av rehabtøkningum frá øllum amtshjálpartólamiðstøðunum í Danmark.

Í 1988 bleiv HTM sett á stovn í Føroyum og starvast í dag 13 fólk. Í 1994 var HTM lagt undir Almannastovuna, og virkar HTM í dag sum deild av Almannastovuni.

HTM er skipað við 4 arbeiðsøkjum: Fyrisiting, faklig málsviðgerð, goymsla og tøkni. Á tøkniligu deildini starvast í dag 2 maskinmeistarar við servitan í rehabtøkni.

Uppgávurnar hjá rehabtøkningunum er ein blandingur av umsitingarligum uppgávum og útførandi arbeiði, m.a. tillaging, projektering, viðlíkarhald og umvælingar av hátøkniligari útgerð, so sum persónslyftum, elevatorum, elkoyristólum og aðrari útgerð. Eisinier ein av uppgávunum í samráði við fakligar málsviðgerarar, at ráðgeva privatum og almennum virkjum, tá talan er um tøknilig hjálpartól og atkomuviðurskifti.

Umsitng av útlæntum hjálpartólum er ein rættuliga stór uppgáva, tá hugsað verður um, at tað síðan 1988 hevur verið veittur stuðul á hjálpartólaøkinum fyri góðar kr. 100 milliónir. Tað finnast í dag umleið 15.000 ymisk tól á marknaðinum. Tólini, ið tøkniliga deildin á HTM umsitur í dag, eru sera fjølbroytt. Tey fevna um alt frá sertillagaðum dósaopnarum, høkjum, nógvum ymiskum lyftum og elevatorum; elkoyristólum útgjørdir við alskins tøkni, ið kann tráðleyst arbeiða saman við teldum, lata hurðar upp og enn tá verða útgjørdir við respiratori, so fólk kunnu anda, um tað er trupuleikin.

Sum skilst av omanfyristandandi, er øki sera fjølbroytt og torgreitt. Sera umráðandi er tí at fylgja væl við tí sum fyriferst á hesum økinum. Fyri at náða hesum setningi, var sett á stovn eitt samarbeiði millum amtstøkningarnar í Danmark. Fyri seks árðum síðani, fekk HTM møguleika at taka lut í hesum samarbeiði, og síðani hevur tøkningurin á HTM tikið lut á ársfundinum hjá amtstøkningunum. Umframt árliga fundin, er hetta samstarvið útbygt til eisini at fevna um eina samskiftisbasu á alnótini, ið Hjælpemiddelsinstitutter (HMI) í Danmark umsitur.

Tá vit hyggja út um landoddarnar og sambera okkara hjálpartólaskrá við hana í øðrum londum, tá er eingin yvi um, at vit eru sera væl við tøkniliga. Arbeiði við hjálpartólum í Føroyum hevur í nógv ár verið sera tungt. Men við einum miðvísum arbeiði seinnu árini bæði frá stovnum, áhugafeløgum politikkarum, og ikki minst teimum rørslutarnaðu sjálvum, er tað eydnast at venda hesi gongd.

Játtanin til hjálpartólaøkið er økt seinastu árini, og hevur hetta veri við til at betra munandi um tænastuna til borgaran. Hetta hevur ført við sær, at hugburðurin mótvegis hesum øki, er vorðin positivur, og er tað at frøast um.

Í sambandi við ár teirra brekaðu, hava tøkningarnir á HTM miðvíst arbeitt við at fáa ársfundinum hjá amtstøkningunum í Danmark til Føroya og á henda hátt er HTM við til at taka ábyrgd fyri samarbeiðinum á hesum øki.

# Skeið fyri Sølu- og Handilsfólk

TÍÐINDASKRIV

Tíðin við at kundin er trúfastur ímóti sínum veitarum, er ikki til longur. Kundin er krevjandi og krevur meira, hann veit hvat hann vil hava og hvat hann ikki vil hava. Kundin er umgyrdur við telefon, fax, sjónvarp, lýsingum, internet, tilboðstúrar við meira. Alt hettar og meira afturat er við til at seta størri og størri krøv til handilslívið. Sølufólk og søluleiðarar í smásølu og sølufólk sum fáast við business-to-business ella selja til smásølur verða tí noydd at renna skjótari og skjótari og mugu laga seg eftir teimum broytingum sum støðugt koma, ger man ikki tað er tíðin skjótt farin frá einum. Í hesum sambandi fer Samskifti í samarbeiði við Danske Sælgere at skipa fyri skeiði í framtíðar sølu og tænastu.

Í døgunum frá 7. til 10. November fer Bo Wurden, detailchef frá Danske Sælgere at halda skeið á Tórshavnar Sjómansheimi fyri fólki sum hava við sølu og tænastu at gera í Føroyum.

Danske Sælgere sum hava 25 ár á baki er ein yrkisligur savningarstaður hjá fleiri enn 27.000 fólkum sum selja. Felagsskapurin er hin einasti, ið leggur fullkomiligan dent á yrkissølu og er ein útbúgvingarstovnur sum stendur fyri útbúgvingum innan sølu, Danske Sælgere er eisini kendir fyri síni vælumtóktu og viðurkendu skeiðir.

Tað eina skeiðið, sum er frá 7. til 9. November er ætlað sølufólki, innanhýsis sølufólki og onnur sum arbeiða við søluarbeiði innan business-to-buisness ella sølu til detailhandlarnar. Kostnaðurin 6.500 kr. Íroknað alt skeiðtilfar, døgurði og drekkamuður.

Hitt skeiðið sum verður 10. november ætlað søluleiðarum og sølufólki í handlum. Kostnaður 3.475

Skeiðini hava til endamál at gera luttakaran føran fyri at leggja til rættis sølu, selja og halda fast við kundar og søluevni. Stórur dentur verður lagdur á, at skeiðluttakararnir fáa gott og haldbart arbeiðsamboð sum tey kunnu arbeiða við, millum annað verður komið inn á ymiskar søluteknikkir, uppgávan hjá einum sølufólki, skilja søluliðini, hvørjar eginleikar sum krevst, planlegging, annalysa og háttar at spyrji uppá, hvussu atfinningar verða til søla og mangt annað.

Tá skeiðið er liðugt, veit luttakarin um og er skikkaður at avgreiða sølu við støði í djúpari vitan um seg sjálvan. Eisini hevur luttakarin lært søluteknikk bæði ástøðiliga og í royndum.
$ Tað er Samskifti, sum hevur tikið stig til skeiðini og kann meira fáast at vita við at ringja á tlf. 422 900.

# Skótatiltak á Argjum

TÍÐINDASKRIV

KFUM-Skótanir á Argjum skipa fyri stórum tiltakið í skúlanum á Argjum leygardagin 25/10/2003 Kl.14.00

- Hoppiborg
- Skreiðirør
- Køku og mat tombola
- Bomm tombola
- Lutaseðlasøla
- Søla av T-Troyggjum
- Kaffi søla
- Mótaframsýning v/SportsWear

Nógvir góðir vinningar so sum kantklippari, teppi, fartelefonir, stálbollar, lampa, gávubrøv, sodavatn Og mangt mangt anna.

Tiltakið byrjar sum sagt í Argjaskúla leygardagin 25 oktober kl.14.00
Lutaseðlanir verða dridnir uml.kl.17.00

# Heystmótasýning á Hotel Føroyum

KUNNINGARSTOVAN Í HAVN
*Tíðindaskriv*

Handlar í miðbýnum skipa fyri stórari mótasýning á Hotel Føroyum

Nú heystið og kuldin er komin, er tíðin eisini til nýggj og onnur klæðir. Tí eru eisini mótasýningar eru kring landið, og í Havn skipa handlar í miðbýnum fyri stórari mótasýning á Hotel Føroyum mikukvøldið 29. oktober kl. 19.30.

Hetta er tíðin at lata seg í heitu klæðini, sum vernd móti vetrarkuldanum, men eisini tíðin til hugnaløtur innandura, til jólaborðhald og veitslur. Seinasta ár var árligi heystmótasýningin hjá miðbýnum flutt niðan í fjøllini á Hotel Føroyum. Tiltakið eydnaðist so væl, at vit aftur í ár fara úr miðbýnum og bjóða til hugnaløtu samstundis, sum vit vísa alt tað nýggjasta innan móta. Úrvalið verður fjølbroytt. Her verður alt frá innast til uttast, til gerandis og veitslu, til børn, ung og vaksin, til konufólk og til mannfólk.

Handlarnir ið sýna fram verða: Alv, Niels Arge, Bamsan/Total, Th. Dam Ítróttur, Events, Fljóðið, Hjá Kissa, Kallkyn, Línbúðin, Mótaskálin, T.M Junior, Seytjan, Sirri, Skálabúðin, Sporty, Vilma, Vogue og Wrangler.

Harumframt hava hesi stuðlað tiltakinum: Maersk Air, Føroya Sparikassi, Tryggingarfelagið Føroyar, Th. Dam á Hálsi, Hotel Føroyar, Keypssamtøkan, Damfar, Akkuleya, Árstíðirnar og Fótbúni

Atgongumerkini kosta 60,- kr. og fáast á Kunningarstovuni. Við í prísinum er kaffi og okkurt afturvið. Atgongumerki er er samstundis lutaseðil uppá ferð til mótabýin Paris og aftur fyri tvey.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 25.10. kl. 19[00]
Leygardagin 25.10. kl. 21[15]
Sunnudagin 26.10. kl. 18[30]
Sunnudagin 26.10. kl. 20[45]




Leygardagin 25.10. kl. 20[45]
Leygardagin 25.10. kl. 23[30]
Sunnudagin 26.10. kl. 20[15]
Sunnudagin 26.10. kl. 23[00]




Leygardagin 25.10. kl. 18[30]
Sunnudagin 26.10. kl. 18[00]




Leygardagin 25.10. kl. 23[00]
Sunnudagin 26.10. kl. 22[30]

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**